## DAGSINS MEINING

# Missur fyri flokk og ting – smeitur fyri fólkastýrið

Tað er ikki bara ein smeitur fyri Tjóðveldisflokkin, at Signar á Brúnni og Finnbogi Ísakson ikki stilla upp til komandi løgtingsval. Hava vit tingarbeiðið, samgongumøguleikar og sjálvstýristilgongdina í huga, er tað eisini ein smeitur fyri fólkaræðið og framtíð Føroya.

Teir umboða í dag tann hóvliga veingin í Tjóðveldisflokkinum. Veingin, sum framvegis hevur bæði beinini á jørðini og sum sær munin á svørtum og hvítum.

Á listanum hjá Tjóðveldisflokkinum í Suðurstreymoy er eingin, sum við politiskari vekt hevur støðu sum Finnbogi Ísakson. Har tykist vera annaðhvørt fult samsint ella politiskar eltibløðrur. Men tað vil tíðin so vísa. Enn er ikki greitt, hvussu listin hjá Tjóðeldisflokkinum í Eysturoynni verður. Men alt bendir á, at Torbjørn Jacobsen verður fremsta valevni – tann sterki maðurin. Almenningurin hevur longu frammanundan fingið snevilin av hansara politiska arbeiðshátti, hugburði og vantandi politiska handfaringarsnildi.

Um Jógvan Durhuus verður valevni hjá vestmenningum er enn óvist. Ætlaninar at fáa onkran annan at stilla upp ímóti honum eru helst gitingar. Føroya fólk má bara vóna, at tað ikki verður onkur meira víðgongdur, sum fer at troka hann av rókini. Hann verður kanska tann einasti – kanska saman við Heina O. Heinesen – sum klárar at halda flokkin frá tí víðgongda rákinum.

Framferðin, tá Signar á Brúnni fekk politiska durafjórðingin, ber ikki júst boð politiska reiðiligheit ella fólkaræðiligan anda. Og tað er júst her, at tann stóri vandin liggur, nú Finnbogi og Signar takka fyri seg, bæði fyri flokk og land. Miðstýringin í flokkinum tykist í so ógvuslig fyri vanligar demokratar.

Vandi, men kanska eisini ein fyrimunur, vil onkur siga. Tí, dugur flokkurin ikki hógv og fær tamarhald á teimum víðgongdu sjónarmiðunum, og samstundis hevur ta politisku tilvitanina um samstarv við aðrar flokkar við meiri veruleikakendum sjónarmiðum, kann flokkurin koma at avbyrgja seg sjálvan úti undir politisku væðingini.

Og tað er spell, tí flokkurin hevur havt grundsjónarmið á fíggjarliga og sosiala økinum, eins og á ríkisrættarliga økinum, sum eru áhugaverd fyri onnur á vinstraveingi. Skal flokkurin framvegis gerast áhugaverdur hjá teimum flokkum, ið hava eina meiri realistiska fatan um politisku møguleikarnar, sum samstarvsflokkur eftir eitt komandi val, skal hann hugsa seg eitt sindur betri um.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Fót undir egið borð

**Heðin Mortensen,**
*løgtingsmaður*



Føroyingar vilja fegnir hava fót undir egið borð. Borðið er ongin trupulleiki, tað er verri við húsunum. Húsaprísirnir hækka nógv skjótari enn lønirnar. Tey lágløntu, tey eldru, tey einligu og tey lesandi eru bara longri og longri frá dreyminum um egin hús ella egna íbúð.

Tey, sum ikki hava eina hampuliga inntøku, fáa ongan rentustuðul ella nakran annan íbúðarstuðul.

Ætla kommunurnar at gera sjálvsognarstovnar, sum skulu leiga fólki íbúðir, so skulu teir stovnarnir gjalda fulla rentu, umframt mvg. Skulu láglønt, tey eldru, tey einligu og tey lesandi so ígjøgnum leiguna gjalda meira enn vit onnur?

Landið eigur ovmikið av jørð, landið eigur milliardir á bók, landið hevur havt yvirskot á fíggjarlógini, so leingi blokkurin var óskorin. So landið kundi saktans havt ein aktivan íbúðarpolitikk. Eldri fólk áttu at kunna flutt í smáar íbúðir, tey við lægru inntøkunum áttu at kunna keypt sær part í úbúðarfeløgum (andelslejlighed). Í løtuni fara túsundtals fermetrar fyri onki. Eldri fólk hava illa ráð at sita í húsum sínum, og kømurni hjá børnunum standa tóm. Men tað loysir seg ikki at leiga út, og tað er ógjørligt at flyta. Av tí sama er útboðið av bæði leiguíbúðum, kømurum og sethúsum til sølu alt ov lítið – og prísirnir høgir hareftir.

Fólk kunnu sjálvi syrgja fyri borðinum og seta fótin undir tað, men tingmenn ráða skattapolitikkinum, rentuískoytinum, treytum hjá íbúðargrunnum, ellisheimum og eldraíbúðum, og øllum hinum, sum er avgerandi fyri, um vit hava egið hús at seta fót og borð inn í.

# Hastverk er lastverk

**Jákup Sverri Kass**
*js_kass@hotmail.com*



Tað eru framvegis fleiri av fremstu loysingarmonnum og kvinnum okkara, sum meina, at tey stóru oljufeløgini skulu tryggja leið føroyinga burturúr tí danska harraveldinum. At rópa um hvussu óljan er okkara, og at óljan er lykilin til loysingina, er ótrúðliga ábýrdarleyst, stutthugsað og "populistiskt". Óljan og altjóðafyritøkurnar koma og fara – Føroyar skulu helst verða varðveittar, og vælferðin skuldi helst verði tryggja, eftir at óljan er uppi.

Veruleikin er tann, at varsemi og skynsemi eru vegurin fram. Eitt samfelag eru tey fólkini, sum mynda tað. Men so leingi vit hava fanatikarar á báðum veingjunum í føroyskum politikki, so fara vit at hava eitt spjatt samfelag. Spjaðingin er tískil ein forðing fyri menning og framburði. Og tíverri hava vit alt ov nógvar politikarar, sum dagliga dyrgja eftir hesi spjaðing.

Men møguliga hevur tann danski forsetisráðharrin nú megnað at tikið bráddin av spjaðingarpolitikkinum. Hann tosar um, at hann vil arbeiða fyri einari hovligari "stig fyri stig" loysn, sum kann hjálpa sjálvstýrisgongdini framá. Hann tosar um eitt ríki við trimum sjálvstýrndi londum - londum, sum kunnu hjálpað og stuðlað hvørjum øðrum. Hetta ljóðar skilagott.

Tað er ongin loyna, at føroyingar altíð fara at hava brúk fyri umheiminum – m.a. á handilsøkinum, á sjúkrahúsøkinum og á útbúgvingarøkinum. Sjálvt um tað kann vera atdráttarmikið at søkja burtur í ókend lond, so er ikki neyðugt at gloyma og bróta niður tað, sum vit hava. Vit hava tað hóast alt ikki so galið.

Ein "stig fyri stig" leið er einasta gongda leiðin til tess at tryggja føroyska samfelagið og føroysku vælferðina. Eg skal gjarna viðganga, at tað tekur eitt sindur longri tíð at yvirtaka, so hvørt sum ráðini eru til tað. Men til tess at tryggja barnafamiljurnar, pensjónistarnar og tey veikastu í samfelagnum, so er tað neyðugt at stuðla teimum hovligu flokkunum - og tískil ikki teimum báðum spjaðingarflokkunum.

Hastverk er lastverk – lat sjálvstýrisgongdina taka tað tíð, sum hon skal hava. Vit skulu ikki steðga sjálvstýrishuganum, sum tendraður er – men vit kunnu skipað hann og geva honum tað tíð, sum er ráðilig. Eg trúgvi veruliga, at teir flestu føroyingar gjarna vilja gjalda sínar egnu rokningar – eins og samfelagið skal gjalda sínar. Men at slítað øll bond og sigla sín egna sjógv uttan at hugsað um fylgjurnar – tað trúgvi eg ikki, at tann meinigi føroyingurin gongur inn fyri.

Við sjálvstýriskvøðu.


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:**
Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:**
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Tíðindaleiðari:**
Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo
**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Anja Weihe anja@sosialurin.fo
**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo
Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1
700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.




# Vantandi barnaansing er ein samfelagstrupulleiki

**– sum lands- og kommununalu myndugleikarnar eiga at loysa í felag**

**Elin Lindenskov**
*býráðslimur í Havn*



Síðani vit fingu Dagstovnalógina 10. mai 2000 hevur lítið og einki verið at hoyrt frá landspolitikarum um vantandi barnaansing. Tað tykist sum um, at nú er tað uppgávan hjá Kommununum einsamallar at loysa henda risastóra trupulleika. Sambært lógini er tilboð um barnaansing ábyrgdarøki hjá kommununum.

**Nógv er hent síðani kommunurnar yvirtóku økið**

Hesi skjótt tvey árini síðani kommunurnar einsamallar fingu ábyrgdina av dagstovnaøkinum, eru heilt nógv nýggj pláss sett á stovn í Føroyum. Onkrar kommunur eru enntá komnar so langt, at tær kunna tryggja stovnspláss til øll børn í kommununi. Samstundis eru tað nakrar kommunur, sum hava sera trupult við at útvega øllum børnum pláss. Tórshavnar kommuna hevur uttan iva nógv tann størsta trupulleikan. Hóast kommunan seinastu nógvu árini hevur útvegað í meðal 100 nýggj pláss um árið, standa yvir 200 børn á bíðilistanum. Trupulleikin í Tórshavnar kommunu er í stóran mun vøkstur í íbúgvaratalinum. Umleið triðingurin av børnunum á bíðilistanum eru flutt til kommununa seinastu tvey árini.

**Loysa trupulleikan í felag**

Landsmyndulleikarnir eiga at samráðast við kommunurnar um at skipa so fyri, at ansingartørvurin verður loystur. Vit eiga at umhugsa at leingja barnsburðarfarloyvið upp til eitt ár, samstundis sum vit útbyggja barnagarðsøkið soleiðis, at vit kunna bjóða øllum børnum mennandi tilboð frá tí degi barnið er 1 ár. Við at leingja barnsburðarfarloyvið minka vit um tørvin á stovnsplássum, samstundis sum vit geva barninum og foreldrunum tryggari umstøður.

Í desember 2001 stóðu 347 børn á bíðilistanum í Tórshavnar kommunu, 199 av teimum eru fødd í 2001 og eru yvir 6 mánaðir gomul. T.v.s at um vit høvdu 1 ára farloyvið, hevði bíðilistin verið 148 børn tá, ístaðin fyri 347.

At leingja barnsburðarfarloyvið fer sjálvsagt at hava meirútreiðslur við sær. Hinvegin so spara vit á stovnsøkinum, tí tað skulu byggjast færri stovnar, raksturin, sum kommunurnar saman við foreldrunum bera, verður eisini tað minni.

**Mælt landsstýrinum til 1 ára farloyvi**

Sosiala nevnd í Tórshavnar kommunu mælti til, tá ið nýggja barnsburðarskipanin var til hoyringar, at leingja barnasburðarfarloyvið upp til 28 vikur beinanvegin og heitti samstundis á Vinnumálastýrið um at virka fyri, at barnsburðarfarloyvið sum frá líður verður longt til 1 ár. Hesa áheitanina valdi Vinnumálastýrið ikki at lurta eftir. Við hesum fari eg at heita á Vinnumálastýrið um at endurskoða farloyvisskipanina, soleiðis at vit fáa eitt ára barnsburðarfarloyvi.

**Páparnir skulu hava sín part av farloyvinum**

Samstundis sum farloyvið verður longt, eiga vit at umhugsa, hvussu skipanin skal virka. Vit eiga at umhugsa, um pápunum skal tryggjast ein part av farloyvistíðini, ella um foreldurini sjálv skulu avgera, hvussu tey sínamillum brúka farloyvið.

**Krevur at fleiri Pedagogar verða útbúnir**

Í løtuni hava vit alt ov fáar útbúnar námsfrøðingar til at røkja pedagogstørvini sum eru. Vit mugu og skula útbyggja barnagarðsøkið soleiðis, at tað verður eins nátúrligt at fáa barnagarðspláss, sum tað er at fara í skúla, tá ið barnið er 7 ár. Tá ið barnaið fer í skúla, er tað ein sjálvfylgja, at tað eru útbúnir lærarar, sum undirvísa teimum. Soleiðis eigur tað eisini at verða í barnagørðunum og vøggustovunum, ein sjálvfylgja at tað eru útbúnir pedagogar, sum eru um børnini og geva teimum eitt mennandi tilboð.

Tí muga landsmyndugleikarnir, áðrenn teir fara at krevja av kommununum, at tær loysa trupulleikan við barnaansingini, at tryggja, at útbúnir pedagogar eru til størvini á stovnunum. Hetta kann gerast við at taka fleiri flokkar inn á Pedagogskúlan um árið, so leingi tørvurin er so stórur sum nú. Mær vitandi eru nógvir skikkaðir umsøkjarar hvørt ár, sum ikki sleppan inn á skúlan, tí har er bert pláss fyri einum pedagogflokki um árið.

**Broyta treytirnar fyri íløgukarmunum**

Landið kann samráðast við kommunurnar um íløgukarmin. T.d. treyta sær, at ávísur partur av íløgunum verður brúktur til at útvega fleiri stovnar. Ella at bygging av barnagørður skal telja minni í íløgukarminum enn aðrar íløgur, so leingi kommunan ikki hevur tryggjað øllum børnum mennandi stovnspláss.

# Samvitskuni bilar einki, Torbjørn!

**Thomas Arabo**



Í fjølmiðlaheiminum sær man ofta at setningar verða tiknir úr samanhangi og nýttir at argumentera við. Hettar verður mett sum vánaligur fjølmiðlasiður.

Høgni Hoydal og Torbjørn Jacobsen fara longur. Teir ávikavíst skoyta uppí setningar ella klípa burtur av teimum tá teir endurgeva. Hettar er ein smartur máti at lúgva uppá.

Torbjørn skrivar í Dimmalætting soleiðis: "Thomas Arabo heldur í blaðnum í gjár,at tað er ódámligt, tá tjóðveldismenn mobilisera grønlendskar fólkatingslimir fyri eina søk", og so gloymur hann "ið teir ikki klára at skapa undirtøku fyri her heima". Eitt ikki týdningarleyst forgloymilsi!

**Noyðast at draga øll møgulig onnur uppí**

So skrivar Torbjørn um nakrar navngivnar grønlendskar heiðursmenn. Eg kenni hesar menn persónliga og kann taka undir við hvørjum orði, ið skrivað verður, og kundi skoytt nógv gott uppí, men góðasti Torbjørn lat vera við at draga hasar dugnaligu heiðursmennirnar niður í títt oratoriska runudíki.

Samanumtikið so snúði mín grein seg um tað ódámliga í at biðja útlendingar – óansæð nationalitet - um hjálp at gjøgnumføra nakað, ið tit ikki hava fingið undirtøku frá einum meiriluta av tykkara egnu landsmonnum.

**Hava gingið í ring í 3 ár**

Eg skilji væl frustratióninia hjá Høgna og Torbjørn. Teir mugu í dag sita við einari kenslu av at hava spilt tíðina, eftir at hava gingið í ring í 3 ár. Aftaná at hava skrivað upp og niður í fleiri ár um at einki stig fyri stig skuldi vera, so eru vit komnir runt. Fyrst skuldu vit hava fullveldi, so skuldu vit hava eina skipaða loysing yvir eitt áramál, og nú skulu vit yvirtaka undir Heimastýrislógini, eins og vit hava gjørt síðani 1948.

Gott at vegurin frameftir tykist greiður. Eg vildi bara ynskt, at menn fóru at fáast við at fremja yvirtøkur í verki og annars reka praktiskan politikk, ístaðin fyri at spæla 20 spurningar til professaran niðri á Fólkatingi við at seta Statsministarnum spurningar, ið hóskandi kundu verið sendir til Zacharias Wang ella Fróðskaparsetrið í staðin.

# Megnar jóla og -nýggjársgávan frá Jenisi

**Petur Hermansen**



Lat meg gera greitt beinanvegin, at eg og Kári Jacobsen eru bestu vinir, men tað er ikki grundin til hetta brævið.

Eftir at eg tvær ferðir í Degi og viku og í bløðunum havi sæð og lisið um viðferina, sum Kári Jacobsen hevur fingið, gjørdi eg av at siga mína erligu hugsan. Hetta geri eg aftan á at vit fingu at vita, at Kári hevði søkt starv sambært lýsing og var settur í starv sambært somu lýsing, og Útvarp Føroya í tíðindumum greiddi frá, at 9. kommunulæknin var settur og skuldi byrja praksis í nýggju hølunum í Gundadali.

Lat meg fyrst takka Elin Lindenskov fyri greiða lýsing av hesum løgna máli.

Fyri fyrstu ferð broytir Tórshavnar Komuna setanarviðurskiftini hjá settum komunulækna og gevur Jenisi hølini, ið Kári Jacobsen av fyrisitingini í býráðnum var settur at byrja í. Og eg spyrji: Hvussu kann hetta lata seg gera?

Jú, lat okkum síggja. Vit hava við ein mann at gera, sum er kommunulækni, løgtingslimur, hevur verið býráðslimur og hevur harvið vinaskaran, ið kann broyta eina avger sum hesa. Hetta kalla vit vina- og kenningapolitik. Soleiðis bar væl til hjá Jenisi at fáa hatta uppá pláss. Hetta er ein stór og fúl skomm, og soleiðis gera teir til egnan fyrimun, ið hava røttu træðirnar at toga í.

Jenis er eisini útvarpsmaður, allarhelst í 5 - 6 nevndum ymsastaðni, journalistur, programleiðari og mangt, mangt annað. Hetta kundi verið áhugavert at vitað: Hvar er Jenis HEILUR? Vit sum hoyra Jenis í politikki kunnu ikki koma uttan um afturvendandi orðini: TEY KRISTNU VIRÐINI og KRISTIN SIÐVENJA. Eg spyrji tí: Var tað út frá hesum virðum og gjøgnum vinarskaran í býráðnum, at Jenis blakaði Kára út úr nýggju hølunum? Jú, hetta er politikkur, tá hann er bestur.

Ein annar spurningur, sum plágar meg: Er tað út frá somu prinsippum og virðum, at Jenis bjóðar Kára hølini, ið hann sjálvur ikki kann brúka ella er tað av øvund – og havisjúku, ella havi eg lisið skrivtina skeivt, at tað ein ikki kann brúka sjálvur, kann man geva øðrum?

At Jenis ger so í móti sínum samstarvsfelaga – og tað sum verri er – sínum BRÓÐRI er mær ein gáta.

Hetta mátti smakka beiskt!

Eg verði noyddur at spyrja, tí her samsvarar hvørki eitt ella annað!

Ein annar spurningur: Er ikki samtykt á løgtingi at løgtingslimur alment bert kann hava HÁLVTÍÐARSTARV við síðuna av tingarbeiðnum, og er tað so livandi galið, at Jenis brýtur hesa LÓGINA? Ella hevur onkur annar skyldina av hesum.

Hvat við Cost-bennefit? At halvtíðar kommunulækni fær dýr og nýggj høli til hálvtíðarstarv, sum hann eftir LÓGINI skal arbeiða? Ja eg spyrji meg sjálvan, hvussu NÓGV kann ein persónur gera undir meginregluni KRISTIN VIRÐI OG SIVENJA?

Hvar er MORALURIN og hvar er SAMVITSKAN?

Ein annar spurningur er: Er henda viðfeðrin í samsvar við stevnuskrá Miðfloksins?

Miðflokkurin, sum skal eitast at virða einkultpersónar og familjur, tað sokallaða demokratiið? Eg skilji framvegis einki?

Jenis hevur sjálvandi rætt til nýggj høli, sum øll onnur, men mátin er skelkandi, og ræðandi.

Tað eru nógvir spurningar eftir, men hesir verða at goyma til løgtingsvalgið komandi, har eg fari at minna á aftur hesa viðferð og hending.

Vónandi svarar tú ikki hesum brævi, tað hevði gjørt støðuna verri fyri teg sjálvan. Men skuldi tú svarað, LAT so verða at VASKA HENDUR, sum tú gjørdi í SVF, ella sum PILATUS gjørdi, eftir at hann hevði felt dómin yvir Jesus. Søgan sigur, at Pilatus flýddi í fjøllini fyri norðan og vaskaði hendur alla ævi sína.

(Hann hevði í minsta lagi eina ringa samvitsku).